# Fororð

Fróðskaparrit 70 (2024), nr. 2: 12-18
Human Rights and the Faroe Islands
©The Author(s) 2024 Open Access under Creative Commons by Attribution License. Use, distribution and reproduction are unrestricted. Authors and original publication must be credited.
www.frodskapur.fo/

**Erika Anne Hayfield[1], Heini í Skorini[2]**

## Menniskjarættindi í einum føroyskum samanhangi

Árið er 1945. Seinna heimskríggj er endiliga liðugt. Nazitýskland er fallið. Og Evropa er í knúsi. Milliónir hava látið lív, og milliónir eru flýdd frá húsi og heimi. Á vári í 1945 koma amerikanskar og sovjetskar herdeildir fram á tær fyrstu nazistisku týningarlegurnar. Og stutt eftir sleppa journalistar framat at dokumentera ein veruleika, sum er so ræðuligur, at fá vilja trúgva honum.

Tann 25. apríl sama ár hittast 51 lond í San Francisco í USA at seta á stovn Sameindu Tjóðir (ST) við slagorðinum "ongantíð aftur!" Herskipaferðslan í havnini í San Francisco er ein áminning um, at kríggið ímóti Japan ikki er liðugt. Samstundis er áleikandi kríggj bæði í Palestina og millum India og Pakistan. Men eftir fimm ára blóðugt stríð ímóti Adolf Hitler og Nazitýsklandi hóma USA, Bretland og Sovjetsamveldið endaligan sigur. Á stovnandi ST-fundinum í San Francisco samtykkja 51 statir stovnandi ST-sáttmálan, hvørs endamál er at fyribyrgja kríggi millum heimsins lond og regulera statsliga atferð, so heimurin "ongantíð aftur" skal tveitast út í nýggj heimskríggj.

Men summir framskygdir diplomatar og politikarar halda, at okkurt manglar. Tað er neyðugt at smíða nýggja altjóða lóg, sum kann fyribyrgja kríggi millum heimsins lond. Men hvat er at gera, tá ið innlendis myndugleikar venda vápnunum ímóti sínum egnu borgarum? Hvørja nyttu hevur friður millum lond, um friður ikki valdar millum borgarar og stat innan fyri landamørkini? Hvussu byggja vit ein nýggjan heim, har einstaka menniskjað hevur rætt til vernd ímóti kúgan, forfylging og mismuni? Hvussu kann altjóða samfelagið slóða fyri eini

[1] PhD, Associate Professor, University of the Faroe Islands, Faculty of History and Social Sciences, Jónas Broncks gøta 25, FO 100 Tórshavn, Faroe Islands, erikah@setur.fo, ORCID ID: 0000-0003-4890-2364.
[2] Associate Professor, Faculty of History and Social Sciences, University of the Faroe Islands Jónas Broncksgøta 25, FO 100 Tórshavn, Faroe Islands, heinis@setur.fo, ORCID: 0000-0001-7982-8908.

framtíð, har hvørt einstakt menniskjað hevur íborið virði og íborin rættindi, sum statsligir myndugleikar hava skyldu til at virða?

Við hesum spurningum í huga fóru diplomatar eisini at smíða altjóða menniskjarættindalóg. Undir leiðslu av fyrsta amerikanska ST-ambassadørinum, Eleanor Roosevelt, varð ein nevnd sett á stovn, sum skuldi orða eina ST-yvirlýsing um universell rættindi. Henda menniskjarættindanevndin hevði umboð úr 18 londum, harav einans fimm umboð úr vesturheiminum. Tí er ósatt, tá ið sagt verður, at altjóða menniskjarættindalóg einans er myndað av vestanlondum.

Fyrsti fundurin í nýggju menniskjarættindanevndini varð hildin á eini gamlari verksmiðju á Long Island í New York í januar 1947. Heimurin stóð nú á gáttini til eitt nýtt kalt kríggj millum eystur og vestur. Hugsjónarligu ósemjurnar vóru stórar og grundleggjandi millum tey nýggju stórveldini USA og Sovjetsamveldið, sum á hvør sínum hermóti høvdu knógvað Nazitýsklandi. Samráðingarnar um eina nýggja heimsyvirlýsing vóru myndaðar av einum samanbresti millum kommunistiska og liberal-demokratiska hugsjón. Sovjetsku diplomatarnir løgdu dent á kollektiv rættindi og borgarans skyldur mótvegis statinum, og amerikanskir diplomatar løgdu hinvegin dent á, at einstaklingurin kemur fram um statin og skal verjast ímóti statsligari uppíblanding og óneyðugari regulering. Ósemjur vóru eisini um javnvágina millum fíggjarlig rættindi (t.d. rættin til mat á borðið, reint vatn, klæðir á kroppin og tak yvir høvdið) og sivil og politisk rættindi (t.d. trúarfrælsið, framsøgufrælsið, atkvøðurætt og savningarfrælsið). Hvørji rættindi eru tey týdningarmestu? Hvussu drúgvur skal listin av rættindum vera? Og hvørji sløg av vælferðartænastum og hvussu nógvar vælferðartænastur kann borgarin krevja av statinum?

Ein onnur grundleggjandi ósemja snúði seg um, hvussu sjálv hugmyndin um rættindi yvirhøvur verður kjølfest heimspekiliga. Hevur einstaka menniskjað nakað virði í sjálvum sær? Um svarið er ja, hvaðani koma so hesi rættindi? Koma tey frá einum gudi ella yvirnatúrligari moralskari skipan? Ella koma tey frá okkum sjálvum? Eru menniskjarættindini givin av hægri metafysiskum myndugleika, ella eru tey ein sosial konventión, sum vit sjálv samtykkja uttan tilvísing til nakran veruleika uttan fyri menniskjað sjálvt?

Eftir drúgvar samráðingar og ósemjur, sum í sjálvum sær er ein bergtakandi søga, varð Heimsyvirlýsing Sameindu Tjóða samtykt tann 10. desember í 1948. Men átta lond tóku ikki undir við nýggju heimsyvirlýsingini. Seks kommunistisk lond atkvøddu ímóti, tí yvirlýsingin legði ov stóran dent á einstaklingarættindi fram um skyldur mótvegis statinum. Tann rasistiski apartheid-staturin Suðurafrika atkvøddi ímóti, tí landið ikki kundi góðtaka rættin hjá øllum til at flyta seg frítt í einum landi, sum var býtt upp í “whites only” og “blacks only”. Og Saudi Arabia atkvøddi ímóti, tí landið ikki kundi góðtaka javnstøðu millum kynini og javnstøðu í hjúnabandinum.

ST-yvirlýsingin var byrjanin til altjóða menniskjarættindalóg, sum seinni er útgreinað í alskyns bindandi ST-sáttmálum. Umframt Evropeiska Menniskjarættindasáttmálan hava Føroyar í dag samtykt hesar sáttmálar:

- Altjóða semjan um borgarlig og politisk rættindi
- Altjóða semjan um búskaparlig, sosial og mentanarlig rættindi
- Sáttmálin um at basa øllum sløgum av mismuni móti kvinnum
- Altjóða semjan um at basa øllum sløgum av mismuni vegna rasu
- Sáttmálin um rættindini hjá børnum
- Sáttmálin móti píning og aðrari ræðuligari, ómenniskjansligari ella mannminkandi viðgerð ella revsing
- Sáttmálin um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek

Stóri spurningurin er so, hvønn týdning og leiklut menniskjarættindini hava í okkara samtíð. Tí samstundis sum statir binda seg til altjóða sáttmálar, verða meginreglurnar og idealini í hesum somu sáttmálum brotin hvønn einasta dag. Pessimistarnir vilja vera við, at samtykt menniskjarættindi ongan týdning hava, tí hóast altjóða lóg og altjóða dómstólar finnast eingir effektivir yvirstatsligir myndugleikar, sum kunnu revsa heimsins lond, tá ið grundleggjandi rættindi verða brotin. Optimistarnir vísa hinvegin á, at uttan formlig rættindi var eingin normativur standardur fyri legitimari statsligari atferð. Uttan altjóða menniskjarættindi vóru eingi ideal at stremba eftir. Flestu statsleiðarar stremba eftir normativari viðurkenning, og flestu statsleiðarar vilja sleppa undan moralskari fordøming í tann mun, tað ber til. Sambært hesi grundgeving eru menniskjarættindini heimsins ringa samvitska, sum kann vera við til at mynda okkara sosialu og politisku atferð. Eisini hóast vit ongantíð gerast samd um, hvussu menniskjarættindini skulu tulkast og setast í verk í praksis.

Hetta tvørvísindaliga rit er ein fyrsta roynd at savna nakrar tekstir, sum varpa ljós á menniskjarættindi í føroyskum samanhangi. Fyrstu seks tekstirnir eru javnlíkamettir, og tann sjeyndi er ein viðmerkjandi grein. Allir tekstirnir snúgva seg um menniskjarættindi, men perspektivini eru ymisk, evnini eru ymisk, og fakliga útgangsstøði fyri hvørja grein er eisini ymisk. Við øðrum orðum eru mong viðkomandi evni og øki, sum ikki verða viðgjørd í hesum umfari. Vónin er, at henda útgávan kann eggja til meiri gransking um menniskjarættindi við fleiri perspektivum.

### *Greinarnar í hesum serriti*

Menniskjarættindi verða vanliga viðgjørd sum løgfrøðilig fyribrigdi, sum eru niðurfest í altjóða og innlendis lógarverkum. Men tey verða eisini fatað sum mentanarlig, sosial, søgulig ella politisk fyribrigdi, sum lata upp fyri fruktagóðum innliti úr ymsum fakøkjum. Hetta fjølbroytnið endurspeglast eisini í hesum serriti, sum inniheldur íkast frá vísindafólki í antropologi, samfelagsvísindum,

løgfrøði, heimspeki, sjúkrarøktarfrøðisøgu, útbúgvingar- og námsfrøði og stjórnmálafrøði.

Sum eitt amboð til at viðgera ójavna, mismun og harðskap hava menniskjarættindi týðandi spurningar í felag við granskingar um borgaraskap. Í so máta eru menniskjarættindi lykil til at skilja mál um borgaraskap, serliga viðvíkjandi menniskjatign, javnstøðu og inklusión/útihýsing, sum eru fleiri av teimum evnum, sum høvundarnir í hesum serriti viðgera.

Sum grundleggjandi normar, reglur og mát kunnu menniskjarættindi verða fatað sum almennur moralur fyri tað, sum er rætt ella skeivt og sum avger, hvussu fólk kunnu ella skulu verða viðfarin av statinum og samfelagnum. Løgtingið hevur samtykt allar menniskjarættindasáttmálarnar omanfyri og tí bundið landið løgliga og moralskt. Hóast menniskjarættindi sum moralsk og lógfest ábyrgd ikki altíð eru sjónlig í samfelagnum, geva sáttmálarnir høvi til at mótmæla móti landinum ella øðrum, sum undirgrava menniskjatign.

Allar uttan ein grein í hesum serriti brúka empiriska tilgongd til at greina menniskjarættindi í Føroyum. Høvundarnir viðgera evni sum sálarsjúku, fosturtøku, kyn, tilflyting og ástøðiligar spurningar ísv. tulking av menniskjarættindaskjølum, og kanna eisini, hvussu rættindi verða allýst ella útint í føroyskum høpi. Summar av greinunum gera galdandi, at viðurskiftini í Føroyum ikki bara ávirka, hvussu ein skilur og fremur menniskjarættindi, men eisini at støðan sum oyggjasamfelag er týðandi, tá ið menniskjarættindi verða skipað. Við øðrum orðum verða menniskjarættindareglur tilevnaðar og framdar í serstøkum staðbundnum høpi. Av tí sama, tá tilgongdin at greina menniskjarættindi leggur dent á kontekst, kemur til sjóndar, hvussu menniskjarættindareglur alla tíðina eru umstríddar og verða ásettar av nýggjum.

Tann fyrsta greinin, sum Turið Nolsøe og Turið Hermannsdóttir hava skrivað, er um føroysku fosturtøkulógina. Greinin hevur heitið: "'Føroyar taka sær av hesum sjálvar': Samanfallið millum kroppsligt og tjóðskaparligt sjálvræði í viðgerðini av abortrættindum". Greinin viðger atfinningar frá altjóðasamfelagnum viðvíkjandi teimum avmarkaðu forsturtøkurættindunum í Føroyum. Slíkar atfinningar eru komnar í CEDAW frágreiðingum, úr Norðurlandaráðnum og frá donskum politikarum, men eingi tiltøk hava verið sett í verk at noyða Løgtingið at broyta lógina. Tað danska kjakið viðvíkjandi fosturtøkurættindum í Føroyum verður kannað við dømum úr almennum donskum kjaki (í donskum útvarpi, bløðum og Fólkatinginum), har funnist verður at føroysku fosturtøkulógini. Følt verður fram í greinini, at tá ið tað snýr seg um kropsligt sjálvræði í mun til statsligt sjálvræði, verður tað statsliga sjálvræðið raðfest hægri, hóast altjóðasamfelagið finst at tí vantandi raðfestingini av kropsligum sjálvræði. Greinin veitir týdningarmikið og áhugavert innlit í, hvussu samráðst verður um kvinnurættindi í Føroyum, sum síðani fáa mótstøðu á altjóðapallum. Í hesum føri sæst, at danska stjórnin verjir rætt føroyinga til sjálvræði, hóast altjóða atfinningar frá menniskjarættindafelagsskapum.

Ta næstu greinina, "Ein søga um støðuna hjá føroyskum sinnissjúkum frá tíðliga í 1800-talinum til seinast í 1960unum", hava Elisabeth O. C. Hall, Jana Mortensen, Annemi Lund Joensen, og Susanne Malchau Dietz skrivað. Høvundarnir kanna úr einum søguligum sjúkrarøktarfrøðiligum sjónarhorni viðurskifti hjá føroyingum við sálarsjúku í tíðarskeiði upp á uml. 150 ár. Kanningin fevnir um tíðina frá tíðliga í 1800-talinum til seint í 1960'unum, tá ið psykiatrisk deild varð sett á stovn í Føroyum. Greiningin hjá høvundunum byggir á søgulig skjøl, munnligar keldur, greinar og bøkur, sum eru støði undir teirra greining av teimum hørðu viðurskiftunum, av viðgerðini av fólki, og av áskoðanum á fólk við sálarsjúku í Føroyum ta tíðina. Serstakliga týdningarmikil partur av greinini er málið um sjúklingar, sum vórðu fluttir úr føroyskum stovnum til stovnar í Danmark – og undir seinna heimsbardaga til Skotlands ella Onglands. Harafturat vísir greinin á tveir umráðandi spurningar, nú ið hesi fólkini fingu viðgerð langt heimanífrá, í fremmandum landi við øðrum máli, við ongum sambandi við familju. Í fyrsta lagi fæst innlit í søguliga fatan av teimum sálarsjúku. Í øðrum lagi sýnir greinin, hvussu Føroyar sum eitt lítið fjart oyggjasamfelag, í stóran mun hava neiliga ávirkað viðurskiftini hjá teimum sálarsjúku við harðari burturflyting.

Tann triðja greinin er eftir Kalpanu Vijayavarathan og hevur heitið "Inkluderandi útbúgving sum menniskjarættindi hjá tilflytaranæmingum í føroyska fólkaskúlanum – ein kanning grundað á føroysk útbúgvingarskjøl og føroyska gransking á økinum". Henda greinin snýr seg um tað týdningarmikla evnið, *útbúgving og mál* sum grundleggjandi partar av menniskjarættindum. Vøksturin í tilflyting tey seinastu árini, sigur greinin, hevur elvt til, at inkludering av tilflytarabørnum í fólkaskúlanum er sett í sera tiltrongdan brennidepil. Henda greinin kannar landsins politikk og lógarskjøl til tess at meta um grundarlagið undir fólkaskúlaútbúgvingini hjá tilflytarabørnum. Tað verður ført fram, at niðurskrivaðir politikkir eru viðkomandi greiningarevni, tí at teir eru partur av kontekstinum og avdúka sostatt diskursir um útbúgvingarrættindi, og hvussu ymiskir hópar av børnum kunna vera inkulderað/útihýst frá slíkum rættindum. Greinin kemur fram til, at føroyskir politikkir ikki í nóg stóran mun arbeiða fyri at inkludera innflytarabørn og í størri mun hella til samlíking viðvíkjandi at læra føroyskt sum annaðmál. Hetta er ikki minst av teirri orsøk, at føroyskt mál og mentan eru ráðandi hugmyndafrøðin sum ramma um almennu skúlaskipanina.

Tann fjórða greinin er "Hvussu javnstøðulóggáva varð til í Føroyum: Ein greining av diskursi", og høvundar eru Erika Anne Hayfield og Jórun Vágsheyg. Greinin er ein kanning av almennum kjaki viðvíkjandi javnstøðulógini og hennara undirliggjandi hugmyndafrøði. Javnstøðulógin varð samtykt í 1994 eftir hart kjak, sum hevði vart í meira enn tíggju ár. Sostatt taka høvundarnir 1980 sum sítt byrjanarár til kanningina um javnstøðudiskursir. Háttalagið í kanningini er diskurssøgulig tilgongd og er ein kanning av blaðgreinum, samrøðum, almennum skjølum og løgtingsorðaskifti um málið. Greiningin vísir, at hóast kynshugburður er broyttur frá 1980 til í dag, er hann framvegist umstríddur.

Harafturat eru kynsnormar í Føroyum, sum eru eitt lítið oyggjasamfelag, avgerandi ávirkaðar av umhvørvinum, evnaðar til av støðugum spenningi millum siðaarv í Føroyum og ávirkan uttanífrá, serstakliga úr Norðurlondum.

Í teirri fimtu greinini, "Menniskjarættindi: Frá teksti til læru" viðgera høvundarnir Kristian Joensen og Jóhan Lamhauge spurningin um, hvat menniskjarættindi veruliga merkir, og hvussu lógarfest, men abstrakt rættindi skulu verða framd í verki. Í politiska orðaskiftinum verða nýggj politisk tiltøk ofta løggildað sum ein spurningur um menniskjarættindi og sum okkurt, sum krevst eftir menniskjarættindareglum. Henda ákallan av menniskjarættindum hendir stundum uttan tilvísing til úrskurð frá myndugleikastovni. Tí viðvíkjandi siga høvundarnir, at tann gjølliga lýsingin av menniskjarættindaamboðum hendir í tvíliðaðari tilgongd við tulking og konstruktión fyri at gera av, um eitt politiskt átak samsvarar við menniskjarættindi. Við tí nýggja málinum millum Føroya Reiðarafelag og Fiskimálaráðið sum dømi føra høvundarnir fram, at ov lítil dentur verður lagdur á munin millum tulking og konstruktión í føroyskari lóggávu.

Einasta kvantitativa kanningin í hesum serriti er sjeynda greinin, sum Heini í Skorini og Herit Albinus hava skrivað. Hon kallast "Ímillum Frítt Val og Pro Vita: Ein kvantitativ kanning um fólksligan hugburð til abort í Føroyum." Høvundarnir vísa á, hvussu málið um fosturtøku tey seinnu árini er vorðið eitt nýtt stríðsevni í føroyskum politikki, og tað ger kanningina enn meira viðkomandi. Í sínari kanning greina høvundarnir hugburðin hjá teimum spurdu mótvegis fosturtøkulógini, og um fosturtøka áðrenn tólvtu viku eigur at vera loyvd. Tað kemur helst ikki óvæntað, at høvundarnir koma fram til, at føroyingar eru ósamdir um málið. Fólk, sum eru fyri at liberalisera fosturtøkulógina, eru sum heild minni religiøs og meiri vinstrahall, og landafrøðiligur spenningur millum miðstað og útjaðara sæst eisini. Tað er áhugavert, at størst sannlíkindi vóru, at tey 30–44 ára gomlu, sum vórðu spurd, vóru ímóti fríari fosturtøku. Tó var ikki – sum í altjóðakanningum – týðandi munur millum menn og kvinnur, ei heldur hevði útbúgving ávirkan á fosturtøkuhugburð.

Tann síðsta greinin er ein viðmerking hjá Jógvani Dalbø Hansen og hevur heitið "Menniskjarættindi og heimspekiligar avbjóðingar". Greinin viðger metafysiska grundarlagið undir menniskjarættindum og ymiskar heimspekiligar tilgongdir til sjálva hugmyndina um, at menniskju hava ávís rættindi. Høvundurin viðger hugmyndina um náttúrugivin rættindi og skilmarkingina millum moralska realismu og moralska antirealismu. Harafturat kannar hann grundgevingarnar fyri og ímóti universalismu mótvegis mentanarrelativismu, og hvørji rættindi skulu roknast upp í "menniskjarættindi". Við øðrum orðum: hvussu langur skal listin vera, áðrenn hann elvir til menniskjarættindainflatión? Við at vísa á høvuðsteinkjarar frá Thomas Aquinas og Thomas Hobbes til Jürgen Habermas og John Rawls, vísir hann eisini á fleiri ymiskar og stundum ósambæriligar heimspekiligar áskoðanir á menniskjarættindi.

Tað, sum kveikti tankan til hetta serritið, er tann týdningur, sum menniskjarættindi hava sum grundarlag undir rættvísi, rættlæti, trivnað hjá borgarum og hvussu skipanir virka í føroyska samfelagnum. Serstakliga hava kanningar av menniskjarættindum við sær verju av viðkvæmum bólkum í samfelagnum. Okkara endamál við hesum serriti er at greina menniskjarættindi og útvega vitan, sum kann fremja tilvitsku og lærdóm, rættvísi og samfelagsábyrgd, og hava við sær neyðugan politikk ella lógarbroytingar. Men allar hugsanir um menniskjarættindi, sum áseta reglur ella fyrimyndir, eru umstríddar og skapa av sonnum ósemju, tí royndin at verkseta menniskja-rættindi hevur við grundleggjandi etisk, mentanarlig og religiøs viðurskifti at gera, sum ikki almenn semja er um: Hvat er eitt rættvíst samfelag? Hvat er eitt tignarligt lív? Hvørja ábyrgd hevur staturin mótvegis tí einstaka? Og hvørji eru mørkini millum menniskjarættindi og skyldurnar hjá menniskjanum?

Hetta serritið er ætlað sum eitt íkast til vísindaligt kjak um menniskjarættindi í føroyskum høpi. Menniskjarættindi eru viðurkent granskingarøki, sum fevnir um fjølbroytt fakøki, og fleiri teirra eru umboðað í hesum serriti. Men vit ásanna, at týdningarmiklir spurningar og ósemjur viðvíkjandi menniskjarættindum ikki eru viðgjørdir.

Okkara vón er, at hetta serrit kann vera eitt stig til at menna, kveikja og seta gongd á meira gransking á hesum øki.